**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1504.**
**Tíðarskeið: 18/2-4/3 - 2015**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Lis Larsen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Ætlanin var at taka eyka hál, um nóg nógv fekst av gýtandi sild (5-100 stykkir), men slíkar nøgdir fingu vit ikki og tí varð einki hál gjørt.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru út mikukvøldið 18/2 og tóku fyrst støðir inni við land eystanfyri, tí tað var nógvur vindur av útsynningi. Tóku síðan støðirnar á Suðuroyarbanka og Sandoyarbanka og norðureftir. Fóru inn at landa týsdagin 24/2. Tóku síðan støðirnar lidnar eystanfyri og fóru á Norðhavið seinna vikuskiftið. Vit tóku allar støðirnar norðanfyri og til miðskeiðis á Mýlingsgrunninum. Tilsamans tóku vit 59 støðir og bert tvær støðir mátti takast umaftur. Veðrið var sum heild ringt.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 5. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var eitt sindur minni at fáa av toski, men meira av hýsu í mun til í fjør. Toskurin var væl fyri og meira av nebbasild var í fiskamagum enn vanligt hevur verið seinastu árini. Ein fullfíggjað samanbering við 2014 fæst við at hyggja at túrfrágreiðingini fyri túr 1406.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1504 (fyrra helvt av yvirlitstrolingini í mars 2015).

| FISKASLAG | KG í 59 støðum | Nytrur | Magar | KG í 64 støðum í fjør | Lutfall KG per støð |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 7684.416 | 614 | 189 | 4842.755 | 1.72 |
| TOSKUR | 6679.963 | 637 | 171 | 9017.542 | 0.80 |
| UPSI | 5201.509 | 584 | 135 | 4533.577 | 1.24 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 2748.61 | | | 3017.096 | 0.99 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 2455.008 | 10 | 10 | 4856.396 | 0.55 |
| SVARTKJAFTUR | 2002.521 | 35 | | 3368.856 | 0.64 |
| LONGA | 1778.449 | 61 | | 959.785 | 2.01 |
| GULLLAKSUR | 1142.894 | | | 1614.644 | 0.77 |
| SILVURMURTUR | 1066.244 | | | 1463.206 | 0.79 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 670.072 | | | 363.743 | 2.00 |
| REYÐSPRØKA | 533.283 | | | 354.252 | 1.63 |
| HVÍTINGUR | 457.112 | | | 209.694 | 2.36 |
| BROSMA | 224.614 | 21 | 2 | 145.943 | 1.67 |
| TUNGA | 199.267 | | | 182.13 | 1.19 |
| SKRAMBUL | 159.668 | | | 147.69 | 1.17 |
| KNURRHANI | 132.328 | | | 123.944 | 1.16 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 125.271 | | | | |
| HAVMÚS | 91.669 | | | 24.06 | 4.13 |
| LÝRUR | 86.415 | | | 1975.947 | 0.05 |
| BLÁLONGA | 79.869 | 2 | | 17.92 | 4.83 |
| LÍTLA BROSMA | 61.583 | | | 8.92 | 7.49 |
| TRANTKONGAFISKUR | 55.634 | | | 30.335 | 1.99 |
| SANDSPRØKA | 50.282 | | | 40.203 | 1.36 |
| HAVTASKA | 47.785 | | | 53.805 | 0.96 |
| LOLIGO | 42.115 | | | 70.38 | 0.65 |
| SILD | 23.784 | | | 4.497 | 5.74 |
| HVASSASPREK | 23.016 | | | 23.752 | 1.05 |
| TINDASKØTA | 21.493 | | | 0.82 | 28.43 |
| ROGNKELSI | 14.165 | | | 26.235 | 0.59 |
| SKØTA | 11.85 | | | | |
| KALVI | 8.013 | 1 | | 1.256 | 6.92 |
| LÁLLA | 7.961 | | | 22.203 | 0.39 |
| STEINBÍTUR | 4.465 | | | 9.57 | 0.51 |
| MAKRELUR | 4.432 | | | 9.967 | 0.48 |
| GLÝSUFISKUR | 2.617 | | | 0.175 | 16.22 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 2.204 | | | 6.081 | 0.39 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0.909 | | | 5.306 | 0.19 |
| NEBBASILD | 0.187 | | | 0.005 | 40.57 |
| TILSAMANS | 33901.677 | 1965 | 507 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1504d.doc.

Petur Steingrund